# Mykines fær eisini sítt listasavn

**Fyrireikingar eru í løtuni til eitt gistingarhús og eitt listasavn í Mykinesi. Endamálið er at veita teim túsundtals vitjandi eina betri tænastu, og geva teimum eitt gott høvi til at steðga longur í oynni**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*



*Mykines er vøkur oyggj. Nú skal so ein ætlan setast í verk, so enn fleiri ferðafólk enn áður kunnu vitja her*

**Mykines:** Nógv fólk hava við árunum vitjað í Mykinesi. Og líkt er til, at henda vakra oyggin bara verður meiri og meiri vitjað framyvir, bæði av føroyingum og útlendingum.

Í øllum førum ætla tey, ið reka Kristianshús at geva sítt ískoyti til at henda gongdin kann halda áfram – og helst økjast eisini.

Tey hava nevniliga søkt Sørvágs kommunu um byggiloyvi til eitt nýtt gistingarhús í Mykinesi. Og samstundis við hetta hava tey eisini søkt um byggiloyvi til eitt listasavn á sama staði.

Málið var fyri á bygdaráðsfundi í desember, og har gav bygdaráðið sítt viðmæli til hesa ætlanina.

Vit meta avgjørt, at tørvur er á hesum báðum bygningunum herúti í Mykinesi.

Og tí vænta vit eisini, at talið av ferðafólkum til oynna fer at økjast munandi í framtíðina, sigur Katrina Johannesen, og sum rekur Kristianshús í Mykinesi.

**Framsýning um Mikines**

Katrina hevur í mong ár rikið hetta gistingarhúsið, har ein hevur havt møguleika bæði at gista og eta.

Hon hevur tí sæð tørvin á at víðka um virksemið, og sjálvandi eisini at geva fólki eitt annað og betri tilboð enn frammanundan.

Hon hevur tí í nøkur ár arbeitt við hesi ætlanini um tveir bygningar á sama øki, har annað verður gistingarhús og hitt eitt listasavn.

Sambært tekningunum verður talan um ein bygning, sum m.a. fer at hava 12 dupultkømur við brúsu og wc, eins og møguleikar verða hjá fólki við soviposum at gista har.

Men ætlanin er eisini at gera eitt høli til framsýning av listarverkum. Og ikki óvæntað er tað listamálarin Mikines sum fer at eiga og fáa ein heiðursssess í hesum savninum.

Tað eru nógv ferðafólk sum spyrja eftir Mikinesi, tá tey vitja herúti. Og tí er tað uttan iva eitt gott hugskot at hava eina framsýning standandi um hann sum persón og við nøkrum av hansara verkum, sigur Katrina Johannesen við Sosialin.

**Gisting**

Á fundinum í bygdaráðnum í farna mánaði var tosað um ætlanina at gera eina lendisætlan og bygdaplani fyri Mykines.

Henda byggiætlanin við gistingarhúsi og listasavni er sera áhugaverd, og metti bygdaráðið eisini, at plaseringin av einum slíkum kom ikki at forða fyri arbeiðinum við einum slíkum.

Fyri Katrinu hevur tað stóran týdning, at gera nakað fyri tey vitjandi í oynni.

Vit miða tí eftir at gera ein hóskandi bygning til gisting, soleiðis at fólk vita, at hesin møguleikin er til staðar og hvar ein hevur møguleika fyri hesum.

Og sjálvandi vóna vit eisini, at fleiri fólk fara at koma til okkara, sigur Katrina Johannesen.

# Ansingarøkið skal samskipast

**Sørvágur:** Í løtuni verður arbeitt við at byggja ein nýggjan dagstovn í bygdini. Hesin verður liðugur eftir summarfrítíðina í ár.

Samstundis sum hesin bygningurin er í gerð, arbeiðir kommunan við tveimum viðurskiftum innan ansingarøkið - í fyrsta lagi einari umskipan og í øðrum lagi eini samskipan av hesum økinum.

Nýggir barnaansingarstovnurin verður um 1100 fermetrar til støddar, og er endamálið at skapa hóskandi karmar fyri barnaansing.

Ætlanin er somuleiðis at lata upp fyri møguleikum at savna saman tær ymisku ansingarskipanirnar í kommununi. Hesar eru sum er býttar millum barnagarð, dagrøkt og frítíðarskúla.

Henda skipanin fevnir um tríggjar av bygdunum í kommununi – Sørvág, Bø og Gásadal – og í henni eru beint niðanfyri 100 børn.

Sambært einum yvirliti frá kommununi eru 41 børn í barnagarðinum Sýslan, 30 børn í dagrøktini í Sørvági, 11 í Bø og 15 børn í frítíðarskúlanum.

**sb.**



*Arbeitt verður nú við at umskipa og samskipa ansingarøkið í Sørvági*

# Byrja útflutningin um ein mánað

**Tað fer helst at ganga ein mánaður ella so aftrat, áðrenn nýggja virkið "Faroe Fresh" kann byrja spennandi virksemið sítt at keypa og útflyta fisk beinleiðis á europeiska marknaðin**

ÚTFLUTNINGUR
*Snorri Brend*



*Sonfinnur Ellefsen veit, hvussu stóran týdning tað hevur at hava góðan fisk*
*(savnsmynd)*

**Miðvágur:** Ætlanin var upprunaliga, at hetta virkið skuldi fara til arbeiðis í summar.

Men sum vituligt er, skulu øll loyvi verða í lagi áðrenn hetta. Tí hevur alt tikið longri tíð enn ætlað.

Tað vanta enn nakrir smálutir í góðkenningini frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Og so vantar eisini nakað av útgerðini. Men um ein mánað ella so, eru vit til reiðar, sigur ein av stigtakarunum, Sonfinnur Ellefsen við Sosialin.

Verður farið undir móttøku og útflutning av fiski tá, so kann virkið verða liðugt, tá várróðurin byrjar aftur í ár.

**Fyrstafloks**

At Sonfinnur var farin undir hesa ætlanina, kemur ikki av ongum.

Hann hevur royndir sum útróðrarmaður, og veit tí, hvussu stóran týdning tað hevur at góðskan á fiskinum er í lagi.

Tað er heilt vist, at er fiskurin feskur og fyrstafloks tá hann er á marknaðinum í Europa, so fæst eisini ein sera góður prísur fyri hann.

Tí er tað at eg sigi: Tveir daga gamlan fisk fært tú einki fyri. Tá er prísurin snøgt sagt burtur, segði hann við Sosialin, tá vit vitjaðu í Miðvági í fjør summar.

# Væl umtókt handbók

**Støddfrøði:** Handbókin í støddfrøði skuldi vera fyri almenningin, og tað er hon so sanniliga eisini vorðin.

Í desember mánaði gav Skúlabókagrunnurin út "Støddfrøði Handbók", sum skuldi verða eitt hjálpitól bæði hjá næmingum, men ikki minst hjá foreldrum teirra. Handbókin skuldi vera ein hjálp í tí dagliga heimaarbeiðinum sum eitt slag av uppslagsverki í støddfrøði.

Tá bókin kom út varð vónað, at hon fór at standa á hvørjari bókahyll kring landið. Og hesum málinum hevur ein í roynd og veru nærum rokkið hesum máli.

Bókamiðsølan, sum selur bøkurnar hjá Skúlabókagrunninum upplýsir, at seld eru ikki færri enn 700 eintøk av hesi bókini.

Nú so nógvar fagurbókmentir eru komnar út og hava selt so væl, er tað at frøast um, at ein slík handbók sum henda er við í fremstu røð, sigur Skúlabókagrunnurin.

**sb.**